# Eli Smith
# f. 1955



Eli byrjaði í kjalarvørrinum á eini serstakari uppliving úti náttúruni í 2003 at menna eina serliga tøkni, har hann vinnur allar sínar litir úr teirri føroysku náttúruni við íblástri frá fornu holu- og pyramidumálarunum, meðan hann hevur lagt oljumálingina á hillina; skitsur og vatnlitir nýtir hann tó við síðuna av. Hann hevur roynt seg innan mangar myndlistaligar greinar, eitt nú innan mosaikk.

## Ein tøkk til Gud, 2006

Tá Eli Smith lýsir føroyska landslagið, tekur hann bókstavliga náttúrunnar egið tilfar við í arbeiðsgongdina og tann heilt serliga litin - nevniliga litin á og úr dusti og ikki tann fagurgrøna ella tann djúpbláa. Tað er jørðin sum jørð, og tað er eisini tann jørðin, sum vit koma úr, og tann jørðin, vit einaferð aftur skulu í. Ein av myndum hansara eitur *Ein tøkk til Gud.* Vatnið og fossurin líkjast ikki vatni og fossi sum so. Vatnið og fossurin kundu verið tikin úr einum øðrum heimi, og litir og umhvørvi eru ikki tey, vit kenna aftur úr landslagnum. Hinvegin eru litirnir kendir fyri tann, sum hevur áhuga fyri tilfarinum og smálutunum í náttúruni. Kanska er myndin ikki eitt landslag sum so, men heldur sjálv náttúran.



Eli Smith, *Ein tøkk til Gud* 2006

♥ Finn myndina og set kross: ☐

♥ Hvussu nógvir stórir steinar eru niðast í myndini? 5 ☐ 6 ☐ 7 ☐

♠ Sært tú í myndini eitt vatn? ☐ ella ein foss? ☐

♠ Kennir tú nakran, sum ikki dámar vatn? ja ☐ nei ☐

♦ Veitst tú, hvørjum tilfari liturin í myndini er úr?

♦ Kennir tú vatn úr bibliusøguni, sum kemur úr einum kletti?

♣ Hvat kunnu vit brúka ein foss til annað enn at drekka úr?

♣ Lýs verkið stutt við tínum egnu orðum?

________________________________________

________________________________________

________________________________________

________________________________________